Nr. 118/2019

Bjarni Hammer
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi fyrireikingum og forkanningum í samband við undirsjóvartunnilin til Suðuroynna, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hevur landsstýrismaðurin sett forkanningarnar av Suðuroyartunlinum í gongd?
2. Um ja, hvussu verða fyrireikingarnar skipaðar og hvør er tíðarætlanin?
3. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin, at tær 5 mió. kr., sum eru settar av á fíggjarlógini fyri í ár, skulu brúkast?

Viðmerkingar:
Tað er av alstórum týdningi, at klárt verður at byrja at bora undirsjóvartunnilin til Suðuroynna, so skjótt Sandoyartunnilin er liðugt boraður.
Tí legði undirritaði fyri Løgtingið uppskot um at stovna partafelag at gera undirsjóvartunnil til Suðuroynna (lm. nr. 43/2019). Uppskotið fall við 2. viðgerð. Løgtingið bleiv undir viðgerðini kunnað um, at landsstýrismaðurin longu hevði ætlanir um, at fyrireikingararbeiðið skuldi setast í gongd beinanvegin. Til at fyrireika undirsjóvartunnilin til Suðuroynna vóru 5 mió. kr. settar av á fíggjarlógini fyri í ár, sum m.a. skuldu brúkast til at gera seismiskar kanningar.
Landsstýrismaðurin metti tó ikki, at eitt alment partafelag skuldi gera forkanningarnar. Ístaðin setti landsstýrismaðurin sítt álit á, at Landsverk var besta boðið at standa fyri kanningunum. Landsstýrismaðurin upplýsti, at Landsverk skuldi gera týdningarmiklu seismisku kanningarnar í summar.
Summarið er longu komið væl áleiðis, og tí er tað sera umráðandi at fáa staðfest, hvør ætlanin er, hvussu gongur við fyrireikingunum og um klárt er at gera seismisku kanningarnar, sum skulu verða lidnar í summar.
Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 23. juni 2020

Bjarni Hammer